# »Rullikøkan« í Hafnarfjørðinum



**Summi eru so hugtikin av sínum starvi, at tey velja sær eitt húsasnið, sum symboliserar starvið og útbúgvingina**

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Sethús, randarhús, tvíhús og raðhús. Kanska ymisk í sniði, men grundleggjandi rættuliga lík. Í Hafnarfjørðinum sunnanfyri Reykjavík eru nógv vøkur sethús, og sigast má, at í sethúsaøkjunum eru tað nógvir hafnarfirðingar, sum gera nógv við at røkta urtagarðin hjá sær. Og ein føroyingur staddur í Hafnarfjørðinum kann fáa nógva tíð at ganga við at hyggja eftir vøkrum sethúsum, og at hyggja eftir vøkrum urtagørðum.

### »Rullukøkan«

Komin til býlingin í Hafnarfirði, sum nevnist Setberg máttu vit føroyingarnir, sum vóru í ferðalagi saman steðga upp eina løtu, og gapa av undran. Á einari høvd omanfyri vegin stóðu eini stuttlig gul "hús". Men tey vóru púrasta rund, og sjálvt vindeyguni í húsinum vóru rund. Vit smíltust og brosaðu øll, og tað var breið semja okkara millum, at vit nú høvdu sæð løgnastu og stuttligastu húsini nakrantíð. Vit skuldu búgva eina viku í økinum beint niðanfyri "tunnina", sum vit valdu at nevna løgnu gulu húsini. Og teir fyrstu dagarnar brúktu vit "tunnina", sum ein varða, tá vit skuldu finna heimaftur.





### Bakarameistari

Men vit fingu skjótt at vita, at talan var ikki um eina "tunnu". Regin Grímsson Eysturoy, sum hevur búð í Hafnarfirði í mong ár fortaldi okkum, at talan var um ein bakarameistara, sum átti tey løgnu, gulu húsini í Setbergsbýlinginum í Hafnarfirði. Maðurin var so stoltur og glaður av sínum starvi, at hann hevði valt at symbolisera starvið hjá sær, tá hann bygdi sær eini nýggj sethús. Og tí hevði hesin íslendski bakarameistarin heilt einfalt biðið ein byggifrøðing tekna eini hús, sum hava sniði á einari rullukøku. Og sum lesarin sær á myndunum, so eru bæði byggifrøðingur og byggiharri komnir væl frá úrslitinum. Stuttligt við fólki, sum velur at gera okkurt øðrvísi. So kunnu vit hvør í sínum lagi ímynda okkum hvussu tey ymisku húsasniðini høvdu verið, um teir ymisku starvsbólkarnir í samfelagnum høvdu valt at fylgja bakarameistaranum í Hafnarfirði.

Bakarameistarin var tíverri burturstaddur í summarferiu, og tí eydnaðist tað ikki at fáa eina samrøðu við hann. Men vit lata myndirnar frá Hafnarfjørðinum tala fyri seg.

BAKKAFROST

## Maskinmeistari

**Søkt verður eftir maskinmeistara til Faroe Salmon Processing Klaksvík**

Faroe Salmon Processing Klaksvík er eitt sera framkomið kryvjivirkið, ið tekur ímóti umleið 15.000 til 16.000 tons av aldum laksi og toski um árið. Á virkinum arbeiða 25 til 30 fólk. Virki er ein partur av samtakinum hjá Bakkafrost, ið umfatar 3 smoltstøðir, 8 alibrúk, eitt kryvjivirkið og eitt portjónsvirkið. Tað arbeiða umleið 220 fólk hjá samtakinum.

**Førleikar:**
Tann, ið settur verður, skal hava viðkomandi royndir og útbúgving.

**Arbeiðið:**
Arbeiðsøkið er alt vanligt maskinarbeiðið, umvælingararbeiði, herundir viðlíkahald, rakstur og stýring av eykalutagoymslu. Í ávísan mun fevnir arbeiðsøkið eisini um brunnbátin »Stígabrúgv«. Viðvíkjandi brunnbátinum er tað serliga bráfangis uppgávur, sum væl kunnu loysast á staðnum.

Løn og setarnartreytir eru í samráð við leiðsluna.

Umsóknarfreist er 31/07-2008

Áhugaði biðast senda skrivliga umsókn saman við prógvi til:

Faroe Salmon Processing
Bakkavegur
FO-625 Glyvrar.

Ella til:
kari@bakkafrost.com



## SØKT VERÐUR EFTIR KASSAFÓLKI

**VIT KUNNU BJÓÐA HESAR ARBEIÐSTÍÐIR:**

Mánadag til hósdag: kl.13.00 - 18.30
Fríggjadag: kl.13.00 - 19.30
Annanhvønn leygardag: kl.13.00 - 16.30

Er hetta nakað fyri teg, so ring til Per á tel 23 34 43 ella send ein teldupost til miklagardur@sms.fo

Tú ert eisini vælkomin inn í Miklagarð at fáa eitt prát.

MIKLAGARÐUR